# Kom við til ársi



## Bátar

Onki er sum í egnum báti at stevna inn í vágna og vita sær at nakrir góðir dagar eru fyri stavn.
Skipað verður soleiðis fyri, at heilt nógvir bátar kunnu liggja við bryggju í Klaksvík, meðan festivalurin er. Treytin fyri góðum bátaplássi er, at boðað verður frá í góðari tíð og at í minsta lagi tvey av manningini hava atgongumerki til festivalin. (Norðoya Kunningarstova, 456939)
BIÐ UM PLÁSS Í SEINASTA LAGI 4. AUGUST 2008.

## Húsvognar

Klaksvík tekur væl ímóti festivalgestum, sum hava valt hugnaligu loysnina at gista undir egnum taki, meðan Summarfestivalurin er. Húsvognar fáa umvegis Kunningarstovuna í Klaksvík ávíst øki í miðbýnum í Klaksvík, sum eisini syrgir fyri at vognarnir verða íbundnir, fáa streym og atgongd til vatn og wc.
(Norðoya Kunningarstova, 456939)
Bið um pláss í seinasta lagi 4. august 2008.



## Náttarbussar

Skipað verður fyri eyka busssambandi á Summar Festivalinum. Bussarnir koyra frá parkeringsøkinum við Kí-høllina. Samband verður til Eysturoynna, Havnar, Vestmanna og Vágarnar. Bussarnir koyra soleiðis:

Hóskvøldið: Kl. 03.00
Friggjakvøldið: Kl. 05.00
Leygarkvøldið kl. 05.00
Bilegging: Tlf. 505220

## Tjalding

**Tjaldingin á Summarfestivalinum verður skipað saman við Kunningarstovuni og bóndunum, sum eiga og vara av vakra bønum í Gerðunum í Klaksvík. Øll sum ynskja tjaldingarpláss á Summarfestivalinum kunnu venda sær til Kunningarstovuna, sum í neyvum samstarvi við Andras Joensen, bónda, fáa ávíst hóskandi og egnað økið. (Norðoya Kunningarstova, 456939)**
**BIÐ UM PLÁSS Í SEINASTA LAGI 4. AUGUST 2008.**

